# hálva milliard





Valbjørn Dalsgarð og Selmar Nielsen framman fyri modellið av verkætlanini



Heðin Mortensen og Valbjørn Dalsgarð taka lógvatak eftir at jørðarbeiðið byrjaði í dag

morgun vóru bæði borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu, Heðin Mortensen, og varaborgarstjórin og formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini, Jógvan Arge.

– Tað er ein kærkomin løta nú arbeiðið verður sett í gongd, segði varaborgarstjórin. Hann tosaði um stóra trýstið á bústaðarmarknaðinum í høvuðsstaðnum og segði, at tað ikki er líkt til, at hetta trýst fer at linka komandi árini.

– Ætlanin á Argjum passar sum fótur í hosu við ætlanirnar hjá kommununi, staðfesti Jógvan Arge og segði, at kommunan alla tíð hevur tikið undir við ætlanini. Ja, enntá skunda undir arbeiðið, so tað ikki skal draga út.

Jógvan Arge vísti á, at í hesi verkætlan er hædd tikin fyri, at tað einaferð í framtíðini eisini skal lata seg gera, at byggja aftan fyri tey raðhús og teir íbúðarbygningar, sum nú verða bygdir har.

Eisini segði varaborgarstjórin, at ein skúli verður bygdur sunnanfyri øki, og at ein barnagarður somuleiðis er í nánd.

## Selt eftir bíðilistanum

Jónsvein Mortensen, stjóri í húsameklarafelagnum Inni, segði, at bústaðirnir verða seldir eftir bíðilistanum hjá kommununi.

– So tey, sum standa fremst á listanum kunnu rokna við at fáa eitt skriv frá kommununi fyrsta dagin, segði Jónsvein Mortensen.

Talan er um góð 200 raðhús og 76 íbúðir, og tað átti at lætt nakað um bústaðartrýstið.

Kortini dugir stjórin í Inni ikki at siga, um hetta fer at lække um høgu húsaprísirnar í høvuðsstaðnum.

Hóast stóra byggiætlanin helst kemur óvart á fleiri, so hevur hon verið í umbúna leingi. Tað eru heili seks ár síðani, at Valbjørn Dalsgarð byrjaði at arbeiða við verkætlanini. Fyri hálvum triðja ári síðani kom Selmar Nielsen upp í leikin. Í dag byrjar jørðarbeiðið, og um árskiftið 2011/2012 er øll verkætlanin liðug.